## DAGSINS MEINING

# Bleytari virði - kvinnuligt framstig?

Vit mugu hugsa meira um tey bleytu - ella tey veiku - í ferðsluni, segði nývaldi formaðurin í teknisku nevndini hjá Tórshavnar býráð í eini frískligari samrøðu við Góðan Morgun Føroyar fríggjamorgunin. Eisini nevndi Marin Katrina Frýdal, at vit eiga at hugsa um súklubreytir og umhvørvi.

Hetta eru avgjørt nýggir tónar at hoyra. Ikki tí, nógv er gjørt fyri ferðsluna, eisini fyri at bøta um umstøðurnar hjá fótgangarunum og børnunum. Men tað er avgjørt ikki gjørt nóg mikið, og vit kunnu ikki siga, at allir vegir, gongubreytir og gøtr, eru nóg trygt hjá fólki - serliga ungum og gomlum at ferðast eftir.

Vit kunnu taka skúlarnar og dagstovnarnar sum dømi um atkomumøguleikar, sum ikki eru nóg tryggir, tá vit hugsa um ta nógvu ferðsluna, sum er klokkan átta á morgni. Í Varðagøtu verða hundraðtals børn sett av hvønn morgun í høgru síðu oman eftir, tí flestu bilarnir koma frá býlingunum, sum liggja omanfyri.

Øll hesi børnini og foreldrini, sum skulu í barnagarð og í skúla, skulu tvørtur um vegin. Og nú er tað einaferð so, at tað eru aðrir bilar, sum ikki skulu seta børn av, sum í skundi koyra oman eftrir somu gøtu, uttan at gáa um, at børn skulu tvrtur um vegin. At størri vanlukkur ikki eru hendar her, er eitt Guðs undur.

Tað sama ger seg galdandi longur niðri við Kommunuskúlan og við Venjingarskúlan á Frælsinum, har børnini verða sett av bilunum í høgra borði og skulu tvørtur um vegin. Heldur ikki her er nóg trygt hjá børnunum at fara tvørtur um í ferðslumeldrinum. Ein bati kundi verið at havt ferðslupatruljur, men ein varandi loysn hevði verið at havt lummar, sum bilarnir kundu koyrt inn í og sett børnini av undir tryggum umstøðum. Men hesum er neyvan pláss fyri.

Tað er frálíkt, at nývaldu býráðspolitikkararnir eru tilvitandi um hesi viðurskifti, sum ikki eru raðfest nóg frammaliga higartil. Í sama viðfangið kann leggjast afturat, at nógvar gongubreytir í høvuðsstaðnum - eisini í høvuðsgøtunum frá miðbýnum - eru so vánaligar, at tær eru ikki farbærar hjá eldri fólki. Og serliga, tá frost ella kavi er. Hóast framstig eru hend, so má upp aftur meiri gerast við henda trupulleikan, tá tað frystur ella kavi er.

Aðrastaðni er vanligt við súklubreytum, men í høvuðsstaðnum er ikki ein tann einasta súklubreyt, hóast meginparturin av vegakervinum er gjørdur av nýggjum seinastu 25-30 árini. Sjálvandi skuldu súklubreytir verið gjørdar eftir øllum skúlavegum so sum framvið Ringvegnum, oman í Hoydalar, framvið R.C. Effersøesgøtu, Marknagilsvegnum, J.C. Svabosgøtu, har eisini nógv arbeiðsláss eru o.s.fr.

Vónandi eru hetta ikki bara tóm orð, men ein politikkur, sum verður framdur í verki. Tað eru øll, sum gjalda skatt, eisini tey, sum ganga, men sum eru í einum vandabólki á vegunum, tí annaðhvørt eru umstøðurnar ikki nóg góðar, ella tí bilførarar eru ov gáloysnir.

Um tað eru kvinnurnar, sum fara at gera allan munin, skal vera ósagt, men í øllum førum er tað gleðiligt, at kvinnurnar í dag eru so væl umboðaðar í Tórshavnar býráð.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Vit kunnu venda gongdini í Suðuroynni

**Jacob Vestergaard.**
*Akrar*



Støðan í Suðuroynni hevur verið ovast á skránni seinastu dagarnar, eftir at Framtaksgrunnurin valdi at steðga virkseminum á fiskavirkjunum í Hvalba og í Vági, og 89 fólk mistu arbeiði.

Ikki tí, útjaðarin hevur verið á skránni longi. Vit hava soleiðis havt nevndir/arbeiðsbólkar sum hava viðgjørt støðuna, og eru niðurstøðurnar at lesa í m-ø. Útoyggjaálitinum og Økismenningarálitinum. Økismenning hevur somuleiðis verið á skránni í blaðskriving og í politiska kjakinum.

Niðurstøðurnar eru greiðar. Útjaðarin má takast meira við. Fyritreytirnar fyri at búleikast í útjaðaranum mugu javnstillast við møguleikarnar í miðstaðarøkinum.

Við einum vælskipaðum samfelag, við javnbjóðis møguleikum allastaðir, fáa vit eitt enn betur samfelag, øllum borgarunum í landinum at gagni. Ongin kann verða tjentur við, at partar av landinum, í hesum førinum Suðuroyggin, bløðir burtur.

Hetta hevur politiski myndugleikin sæð, og hevur tikið tung tøk fyri at fáa útjaðaran við. Vágatunnilin, Norðoyatunnilin, Teistin, Smyril, ferjulegur á Syðradali og Trongisvágsfjørði, tunnil til Gásadals og skjótt tunnil Hov-Øravík v.m. eru talandi dømir um tað.

Fast samband gevur serliga góðar umstøður, og kunnu møguleikarnir hjá Vágoynni og skjótt Norðoyggjum tí ikki samanberast við møguleikarnar í Sandoynni og serliga Suðuroynni. Í hesum sambandinum kann nevnast, at útoyggjarnar eru í einari serligari støðu, ørvísi enn Sandoyggin og Suðuroyggin, og mugu tí viðgerðast fyri seg.

Politiski mynduleikin má tí fylgja økismenningini upp, serliga viðvíkjandi Sandoynni og Suðuroynni. Hvat skal til í Sandoynni vita sandoyingar betur enn eg, og skal eg tí halda meg til Suðuroynna.

Fyri at suðuroyingar, ja allir føroyingar, skulu fáa gagn av íløgunum sum framdar eru/verða í Suðuroynni, mugu vit fáa Suðuroynna upp á sama støði, sum restin av landinum.

Í hesum sambandinum kann eg ikki lata vera við at nevna kommunusamanlegging, sum eg metið verða avgerandi, fyri at vit kunnu venda gongdini.

Tað verður nógv tosað um, at Suðuroynni tørvar hjálp, og satt er tað, men fyri at vit kunnu verða før fyri at móttaka "hjálp", hvør hon so verður, mugu vit fyrst finna útav at "hjálpa okkum sjálvum".

Fyri at møgulig "hjálp" skal verða til gagns fyri alla Suðuroynna, og koma okkum øllum tilgóðar, mugu vit gera okkum tilreiðar at móttaka "hjálpina", og tað gera vit einans við at leggja kommunurnar í Suðuroynni saman, so Suðuroyggin verður ein samansjóða eind.

Við Suðuroynni sum einari sterkari kommunu, samanhildi við ætlan landsstýrisins um at leggja fleiri uppgávur til kommunurnar, høvdu vit fingið væl av tiltrongdum almennum arbeiðsplássum til Suðuroynna, og kundu á tann hátt verið við til at vent gongdini.

Løgting/landsstýri høvdu tá havt ein lokalan myndugleika at samskift við og ikki sum nú, 7 ymiskar, sum hava trupult við at draga eina línu. Kjakið um miðnámsskúla, heilsuskúla og ellisheim í Suðuroynni er talandi dømi um trupulleikar, sum vit sjálv kunnu gera nakað við.

Eg vil tí heita á borgarstjórarnar í Suðuroynni, sum komandi vikuskifti skulu møtast at viðgera støðuna í Suðuroynni, um at síggja veruleikan í eyguni, og taka stig til samráðingar um kommunusamanlegging, har øll Suðuroyggin verður ein kommuna.

Tá vit hava skipað viðurskiftini betur á kommunala økinum, ivist eg onga løtu í, at løgting og landsstýri vísa okkum tað neyðuga vælvildina, so vit verða javnstillaðir við almennum arbeiðsplássum, havandi í huga áður nevndu íløgur í samferðslukervið.

Við einari kommunu kundu vit eisini hjálpt betur til á vinnuliga økinum. Vit høvdu tá staðið saman sum ein, og skapt neyðugu karmarnir um alla oynna.

Her mugu vit eisini læra at "hjálpa okkum sjálvum" og fyrst brúka tær tænastur vit hava í Suðuroynni, áðrenn vit fara aðrastaðir, umframt at vit kundu valt okkum samstarvspartnarar á ymiskum økjum, sum vóru sinnaðir til at stuðla uppundir vinnulívið í Suðuroynni.

Neyðugt er at gera støðuna upp á vinnuliga økinum, kanna møguleikar, og gera ætlanir fyri framtíðina. Hetta kundi land og kommuna staðið fyri í felag.

Vónandi fylgir Framtaksgrunnurin ráðunum frá "serfrøðingunum" og einskiljir Fiskavirking, so suðuroyingar, møguliga saman við øðrum, fáa møguleikan til at nýta flakavirkini sum Framtaksgrunnurin eigur á Tvøroyri og í Vági.

Tankin um at suðuroyingar, møguliga saman við øðrum, í einum felag, stóðu fyri allari fiskaframleiðsluni í Suðuroynni, er áhugaverdur og átti ikki at verið so fjarður.

Hóast vit eru á markinum, har tað kann verða trupult at venda gongdini, hava vit, sum nevnt, møguleikar sjálv at gera nakað við tað. Tað er tí avgerandi neyðugt, at vit taka av hesum møguleikanum og "hjálpa okkum sjálvum" fyrst og fremst, tí so fáa vit neyðugu hjálpina frá øðrum eisini.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.


**Innsent tilfar**

Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.